# Føroyska operan á forsíðuna í Íslandi

**Størsta íslendska avísin, Morgunblaðið, hevði mánadagin føroysku operuna Í Óðamansgarði á forsíðuni. Íslendingar hava sýnt áhuga fyri at fáa operuna til Íslands.**

MENTAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Ikki bara her heima verður fylgt við í fyrireikingunum til fyrstu føroysku operuna á palli. Í hesum døgum koma 6 útlendsk fjølmiðlafólk til landið at ummæla og skriva um operuna í bløðum sum danska Politiken og bretska The Times. Mánadagin kom operan á forsíðuna á størstu íslendska dagblaðnum Morgunblaðið.

Í blaðnum er samrøða við íslendska tenorin, Eyjólf Eyjólfsson, sum hevur ein høvuðsleiklut í føroysku operuni. Hann sigur, at operan er eitt krevjandi verk, og tí hava tey vant hart ta seinastu tíðina. Hann heldur tað vera sera spennandi at luttaka, men ger samstundis vart við, at opera avgjørt ikki er nøkur siðvenja í Føroyum.

**Fáar sýningar**

Hóast stóra áhugan fyri fyrstu føroysku operuni bæði í Føroyum og uttanlands, verður einans stutt høvi at uppliva hana á palli í Føroyum. Hon verður einans sýnd komandi vikuskifti. Fyrsta sýning verður hóskvøldið 12. oktober kl. 19.30, og seinasta almenna sýning verður bara fýra dagar seinni, sunnudagin 15. oktober kl. 16.00.

Ein sýning kostar út við 40.000 kr. og tí eru ikki ráð til at hava sýningar í fleiri vikur. Stóri áhugin fyri operuni uttanlands er tó ein ábending um, at føroyska operan kanska verður at síggja á palli úti í heimi. Umframt fjølmiðlar hava eisini fyriskiparar í Íslandi sýnt áhuga fyri operuna og hava tosað um at fáa hana til Íslands. Sami áhugi er eisini í øðrum londum.


ÓÐAMANSGARÐUR
EYJÓLFUR EYJÓLFSSON TEKUR ÞÁTT Í FYRSTU FÆREYSKU ÓPERUNNI >> 34
HVERNIG ER BEST AÐ EIGNAST SÓFASETT?
SPARNAÐUR
FJÁRMÁL >> 21
Morgunblaðið
STOFNAÐ 1913 | 274. TBL. 94. ÁRG.
MÁNUDAGUR 9. OKTÓBER 2006
PRENTSMIÐJA MORGUNBLAÐSINS | mbl.is
Minntust fórnarlamba jarðskjálftans
Ár liðið frá því yfir 73.000 manns létu lífið í hamförunum ógurlegu í Pakistan
Einbeiting í ungbarnasundi
Sögulegar viðræður
Lýstu áhyggjum sínum vegna áforma N-Kóreu
Aldrei fengið jafn sterk viðbrögð við neinu
Eva María Jónsdóttir telur að taka þurfi meira tillit til þarfa barnanna
Vildu vera Frakkar

# Piaf í Sjónleikarhúsinum

**Leygarkvøldið 14. oktober verður fyrsta sýning í Sjónleikarhúsinum av leikinum »Piaf« eftir Pam Gems í føroyskari týðing hjá Hans Tórgarð og Jytte Joensen**

SJÓNLEIKUR



Havnar Sjónleikarfelag hevur á hesum sinni sett øll segl til at gera eina tíðarleysa uppseting av leikinum um franska sangfuglin “Edith Piaf” – eisini rópt “Tann lítli spurvurin”.

Edith Piaf er fødd í 1915 í París. Tað verður sagt, at hon varð fødd á gøtuni og vaks upp har saman við gyklarum, horum og øðrum góðum fólkum. Pápin var gøtusangari og mamman hevði eisini sungið alment á gøtuni, tá ið hon var ung. Edith fór sjálv at syngja, og gjørdist kend sum gøtusangari longu 15 ára gomul. Seinri sang hon á øllum týðandi pallum bæði í París og uttanlands.

Lívið hjá Edith var fylt við dramatiskum hendingum. Hon var elskað av fólkinum bæði í heimlandinum og bæði fyri eystan og vestan Atlantshav. - Ólukkuligur kærleiki, bilvanlukkur og eitt hart lív við rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu gjørdi, at hon sjáldan kendi seg lukkuliga. – Hon doyði sum 47 ára gomul í 1963 og 40.000 fólk fylgdu henni til seinasta hvíldarstaðið. – Onkur hevur sagt soleiðis “Edith brendi ígjøgnum á pallinum, men brendi út í lívinum” - Sjálv segði hon “ Onki angri eg!”

Jytte Joensen, ljósmóðir og sjónleikari fer at tulka og syngja krevjandi leiklutin “Piaf”. Eyð Matras leikar vinkonuna “Toine” og 13 sjónleikarar spæla teir 33 leiklutirnar í sangleikinum.

Venjingin er farin fram undir leikstjórn hjá kenda og dugnaliga íslendska leikstjóranum Sigrún Valbergsdóttir

Agnar Lamhauge, tónleikari spælir kontrabass og stjórnar tónleikinum. Hann og Stamen Stantchev, tónleikari hava útsett tónleikin fyri fyri klaver, keyboard og harmoniku.

Pallin hava Anna Sofía Egilstrøð og Óli Petersen (Óli P.) teknað og skapt.

Búnar, hár og smyrsl hevur Barbara í Gongini designað. .

Turpin N. Djurhuus, ljósdesignari hevur ljóssett leikin, og hevur ljósstýringina um hendi.

Sjónleikarhúsið hevur fingið ein nýggjan ljóðpult til hesa sýning.

Jón Mc Birnie, ljóðserfrøðingur hevur ljóðseting og bland um hendi og stýrir ljóðinum.

Gulla Øregaard er framleiðslustjóri, og hevur staðið fyri at tilrættisleggja framleiðsluna og samskipa ymsu tættirnar, eftir at avgerð var tikin um, at leikurin skuldi á pall í Sjónleikarhúsinum.

Leikarar, hárfríðkanarkonur, búnakonur, pallsmiðir, pallfólk, pallstjórar, rekvisitørur, hjálparleikstjóri, teskarar og onnur serkøn fólk hava, umframt tey nevndu, skapt hesa uppseting - 50 fólk, sum øll hava havt sína gongd í Sjónleikarhúsinum hesar 7 vikurnar, meðan uppsetingin er gjørd.

Tórshavnar kommuna hevur veitt felagnum stuðul til stórar umvælingar av húsinum, og eisini til rakstur av virkseminum.

Frá 1. august 2006 er Oddvá Nattestad sett sum leiðari í Sjónleikarhúsinum, og hevur, umframt nógvar aðrar uppgávur, átikið sær at vera dagliga sambindingarliðið til uppsetingina av “Piaf”.

# Tutl skrivað sáttmála við íslendskt felag



*Samúel Kristjánsson, Frost, og Kristian Blak, Tutl, byrjaðu sunnudagin nýtt samstarv við nýggjum sáttmála millum útgávufeløgini í Íslandi og Føroyum*

*Mynd: Robert Larsen)*

**Sunnudagin settu Kristian Blak og Samúel Kristjánsson nøvn síni á ein sáttmála millum Tutl og Frost, ið snýr seg um útbreiðslu av útgávum hvør hjá øðrum**

Tónleikur
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Íslendska felagið Frost og føroyska Tutl skrivaðu sunnudagin undir sáttmála í Norðurlandahúsinum. Sáttmálin snýr seg um útbreiðslu, distributión, av tónleikaútgávum hvør hjá øðrum.

Leiðarin fyri Frost, Samúel Kristjansson, hevur vitjað í Føroyum um vikuskiftið og sunnudagin settu Samúel Kristjansson og Kristjan Blak nøvn síni á sáttmálan vegna feløgini bæði.

Kristian Blak frá Tutl sigur, at Tutl sær hetta sum eitt stórt framstig og felagið vónar við hesum at koma uppaftur á tey sølutøl, sum felagið hevði í Íslandi í 2002 – 2003. Samstundis roknar Tutl við at distribuera heilt fitt av fløgum hjá Frost í Føroyum.

Frost er nýggja navnið á felagnum 2112. Felagið víðkar og kemur við nýggjari heimasíðu í næstum. Enn er heimasíðan tó www.2112.is og leinkja til hesa síðuna er eisini á www.tutl.com.